


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 03 - 2012

# Bjóða oljuútbúgving og arbeiði í einum

700 nýggj arbeiðspláss áðrenn 2015. Tað er kravið til Songa Offshore, sum hevur yvirtikið tveir pallar frá Odfjell í summar, samstundis sum teir hava leigað út til Statoil frá 2014 og átta ár fram. Hetta hevur við sær, at Songa Offshore tørvar nýggja arbeiðsorku til frálandavinnua, og hetta eru tey nú farin at fyrireika seg til. Vit kunnu ikki bara stjala fakfólk frá hvørjum øðrum. Vit mugu fáa nýggj fólk inn í vinnuna, sigur HR-stjórin í Songa Offshore, Bjørg Ueland, við Offshore.no. Tí hevur Songa Offshore gjørt avtalu við Stavanger Offshore Tekniske Fagskole, har ein serligur Songa-flokkur er gjørdur. Her kunnu fólk við viðkomandi útbúgving eitt nú skúlast innan petroleumstøkni og boring, fyri síðani at fara til verka fyri Songa Offshore. Sambært Offshore.no skal Songa Offshore hava 40 nýggj fólk til frálandavinnuna í ár. Sostatt kemur talið av starvsfólkum í Songa Offshore at liggja um 450 við árslok, men áðrenn 2015, tá teir fýra pallarnir til Statoil skulu takast í nýtslu, hevur fyritøkan væntandi 1100 fólk í frálandavinnuni.